# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 13. januar 2020
Mál nr.: 20/00019
Málsviðgjørt: PB
Eftirkannað:

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um taðing**
(Heimild at geva undantaksloyvi at sleppa av við tøð í úrtíð)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 72 frá 29. mai 2012 um taðing verða gjørdar hesar broytingar:

§ 6, stk. 3-6, verða strikað, og í staðin verður sett:
"*Stk. 3.* Kommunan kann geva einum ábyrgdara undantaksloyvi til undir nærri tilskilaðum treytum at sleppa sær av við tøð í úrtíð, um ólag á skipanum ella innrættingum ella týðandi fyrilit fyri øðrum virksemi gera tað neyðugt. Ábyrgdarin skal í skrivligari umsókn um undantaksloyvi lýsa tørvin, ætlanina, nøgdina og slagið av tøðum, staðsetingina, støddina á lendinum, har ið ætlanin er at spræna tøðini, og við hvørjum millumbili ætlanin er at taða.
*Stk. 4.* Kommunan skal beinanvegin við almennari lýsing á svørtu talvu, heimasíðu ella aðrastaðni kunna sínar borgarar um eitt undantaksloyvi sambært stk. 3 og treytirnar fyri loyvinum."

**§ 2**

Henda kunngerðin kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 13. januar 2020

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

/

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn

Tel: +298 306600 • Fax: +298 306665 • E-mail: uvmr@uvmr.fo